## Nita Næs fyri fyrstu ferð á tingi

Hesa vikuna er full javnstøða í tingbólki Javnaðarfloksins á tingi, tí nú umboða tríggjar kvinnur og tríggir menn Javnaðarflokkin: Katrin Dahl Jakobsen, Eyðgunn Samuelsen, Nita Næs og John Johannesen, Gerhard Lognberg og Mikkjal Sørensen. Nita Næs er triða eykafólk hjá Javnaðarflokkinum á tingi. Meðan Jóannes Eidesgaard og Helena Dam á Neystabø hava farloyvi úr tinginum, og fast eykafólk fyri tey eru Andrias Petersen og Eyðgunn Samuelsen. Mikkjal Sørensen hevði fast sæti fyri Hans Paula Strøm, sum nú aftur er tingfólk. Hans Pauli Strøm umboðar í løtuni løgtingið á ST aðalfundinum í New York, meðan Andrias Petersen eisini hevur farloyvi.



## Flogskiparin var fullur

Tey 124 ferðafólkini sótu klár í einum flogfari hjá Unites Airlines, sum skuldi úr London til Chicago í gjár, tá tey fingu boð um at fara úr flogfarinum, tí at flogskiparin var vorðin sjúkur. Men hann var ikki sjúkur. Hann var fullur. Tann 51 ára gamli flogskiparin Erwin Vermont Washington varð tikin og er nú skuldsettur fyri at hava brotið reglurnar um rúsdrekkaflúgving. Hann verður tó ikki ákærdur, fyrr enn løgreglan hevur fingið úrslitið av blóðroyndini, sigur Scotland Yard. United Airlines sigur, at felagið setir trygdina í hásæti, og at allar manningar hava strangt forboð fyri at brúka rúsdrekka í arbeiðstíðini.

# vera stjóri

**LØNIR**

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Lítið, nógv, meira og astronomiskt. Munur er á, hvat -fólk tjena um mánaðin. Men hóast Føroyar eru smáar og fólkini fá, merkir tað ikki, at lønirnar eisini eru tað.

Føroysku stjóralønirnar ganga heilt úr vanligu verkamannalønini og meira enn tíggjufaldað upp til góðar 250.000 krónur um mánaðin, í øllum førum hjá øllum teimum skrásettu feløgunum í Føroyum.

Serliga er tað í privata vinnugeiranum, at stjóralønirnar eru høgar, meðan almennu partafeløgini eru eitt vet meira afturhaldin við at gjalda tær heilt stóru løturnar. Tó so, stjórarnir í almennum partafeløgum koma eisini høgt upp á listanum.

Um tær ymsu vinnugreinirnar verða samanbornar, er tað heilt víst bankavinnan, ið stendur fyri teimum størstu lønunum til stjórnina – tað er stjóri og nevnd.

Í 2008 lá Smyril Line, sum sama ár mátti fáa 30 milliónir krónur frá almennu Føroyum, á einum triðjaplássi, við góðum 3,3 milliónum krónum í samsýning til stjórnina. Tó hevur eitt stjóraskiftið, sum fór fram tá, helst kostað ein stóran bita av hesum, umframt at tað síðan vóru settir tveir stjórar.

Fiskivinnan er ikki heilt eiðasør heldur, hóast bert seks av 25 feløgum á topplistanum eru innan fiskivinnuna, og tað at stjórna tryggingarfyritøkum, er heldur ikki at kimsa at.

Í ársroknskapunum hjá einum parta- ella smápartafelag stendur tilskilað, hvussu nógv er útgoldið í samsýning til stjórn og nevnd, og inni á vinnuheimasíðuni Vinnuvitan.biz er gjørligt at fáa ein topp 25 lista yvir samsýningar til stjórn.

Vit hava hugt eftir, hvørjir teir vóru, sum tjentu mest pening í 2008, og hartil hava vit eisini hugt eftir, um ein dýr leiðsla er ein leiðsla, sum gevur mest yvirskot.

### Peningastovnar

Skal tú vera stjóri, loysir tað seg best at vera stjóri í einum peningastovni. Gjøgnumskygnið í roknskapunum hjá bankunum er sera gott, og serliga hjá Føroya Banka og Eik Banka eru als ongar upplýsingar um lønir og treytir hjá stjórunum goymdar.

Tí kunnu vit lættliga greina, hvat teir mennirnir, sum hava ábyrgd av at ansa eftir okkara uppsparinum og veita okkum lán, sjálvir fáa í løn afturfyri.

Og tað er ikki so lítið. Meðan Eik eigur toppskorarn, er tað Føroya Banki, sum tilsamans betalir meira enn hinir, og í teimum báðum smáu sparikassunum er nokk við einum stjóra.

Hinvegin er tað heldur ikki so galið at sita í nevndini í einum banka, Eik upplýsir, at nevndarformaðurin fær 384.000 um árið, næstformaðurin 259.000 árliga og hvør nevndarlimur fær 184.000 árliga fyri at sita í nevndini, meðan tað hjá Føroya Banka er eitt sindur meira innviklað, har tann sum fær mest, fær meira, og tann sum fær minst fær minni enn í Eik Banka.

### Hinar vinnurnar

Stjóralønirnar aðrastaðni eru tó heldur ikki at kimsa at, hóast tær kanska ikki eru eins høgar og í peningastovnunum.

Smyril Line hevði stórar útreiðslur upp á stjórar, men var hetta, sum áður nevnt helst orsakað av stjóraskiftinum. Tó er eingin í ivi um, at stjórarnir har, Peter S. Holm, og Rúni Vang Poulsen, fáa ein góðan posa av pengum afturfyri.

Hjá NCC, sum er útlendskt felag, er tað ein stjóri, Peter Gjørup, ið saman við nevndini fer við allari puljuni.

Bygma Balslevs Timburhandil liggur eisini sera ovarlaga, og har eru tað tríggir stjórar.

Hjá Havsbrún er tað tó eisini ein heilt fittur pengi at fáa. Stjórin, Bergur Poulsen, og nevndin fáa tilsamans 2,5 milliónir krónur, meðan parturin hjá nevndini liggur um 600 – 800.000 krónur.

Hjá Dimmalætting eru tveir stjórar um at býta 1,7 millión krónur millum sín, og ópopulera postverksstjórastavrið gevur eisini fitt av sær, um 0,9 – 1 millión krónur árliga.

Eitt, ið kanska undrar, er at stjórin í tí størsta samtakinum í landium, Føroya Tele, ikki fær meira í sín posa. Kristian Reinert Davidsen, sum stjórnar samtakinum, fekk í 2008 knappar 1.3 millión krónur í løn, umframt okkurt smátt fyri at vera nevndarformaður í døtturfeløgunum.

Restin av listanum verður til lesaran at gruna yvir.



**Søren L. Bruun**
*Stjóri – Suðuroyar Sparikassi*
*0.871 mió. árliga*
*72.600 mðr.*

## Topplistin

| Nr. | Felag | Samsýning til stjórn* | Ársúrslit 2008 |
|---|---|---|---|
| 1 | Føroya Banki P/f | 5.106.000 | 170.794.000 |
| 2 | Eik Banki P/f | 4.820.000 | -314.075.000 |
| 3 | Smyril-Line P/f | 3.334.000 | -207.884.000 |
| 4 | NCC Construction A/S (Útl.fel) | 3.026.000 | 151.917.000 |
| 5 | Bygma Balslevs Timburhandil & Byggibúð P/f | 2.804.000 | 608.000 |
| 6 | Havsbrún P/f | 2.545.000 | 56.925.000 |
| 7 | Norðoya Sparikassi (sjálvsognarst.) | 2.097.000 | -55.110.000 |
| 8 | Faroe Seafood P/f | 2.053.000 | -44.000 |
| 9 | Atlantic Airways P/f | 2.027.000 | 15.314.000 |
| 10 | Atlantic Petroleum P/f | 1.797.000 | -89.657.000 |
| 11 | Dimmalætting P/f | 1.705.000 | -25.503.000 |
| 12 | Mest P/f | 1.626.000 | 2.080.000 |
| 13 | S.M.S. P/f | 1.622.000 | 16.738.000 |
| 14 | Mentir P/f | 1.619.000 | 5.642.000 |
| 15 | Postverk Føroya P/f | 1.566.000 | -2.483.000 |
| 16 | Føroya Trol P/f | 1.344.000 | 2.362.000 |
| 17 | Tryggingarfelagið Føroyar P/f | 1.325.000 | -51.471.000 |
| 18 | Telefonverkið P/f | 1.285.000 | 18.284.000 |
| 19 | Føroya Lívstrygging P/f | 1.259.000 | -45.648.000 |
| 20 | Install Sp/f | 1.200.000 | 2.770.000 |
| 21 | Fiskaheilsutænastan Sp/f | 1.190.000 | -48.000 |
| 22 | Landshandilin P/f | 1.190.000 | 542.000 |
| 23 | Trygd Tryggingarfelag P/f | 1.175.000 | 9.685.000 |
| 24 | JFK P/f | 1.151.000 | 1.600.000 |
| 25 | Bakkafrost Holding P/f | 1.142.000 | 37.121.000 |

*Kelda: Vinnuvitan.biz*

** Stjórn er í fleiri førum stjóri /ar og nevnd*